# Vandi fyri at lívæðrin til útjaðaran verður kvett av

**– Kappingarráðið hevur kravt, at Farmaleiðir hjá Strandferðsluni skulu ikki geva hall næsta ár og tað kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri útjaðaran í Føroyum**

FARMALEIÐIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Farmaleiðir hjá Strandferðsluni hava altíð verið mettar sum ein lívæðr í føroyska samfelagnum, serliga til útjaðaranær.

Men nú er vandi fyri, at hendan lívæðrin verður kvett av.

Kappingarráðið hevur nevniliga kravt, at næsta ár skulu Farmaleiðir hjá Strandferðsluni ikki geva hall.

Tað merkir antin, at prísirnir á farmaflutninginum skulu hækkast munandi, at útreiðslurnar skulu lækka munandi ella eitt sindur av báðum.

Í 2004 høvdu Farmaleiðir eitt hall uppá 9,9 milliónir, men í fjør var tað eitt sindur minni.

Men í øllum førumer talan um eitt stórt hall.

Hetta merkir, at í meðal skulu prísirnir at flyta farm við Farmaleiðum hækka 50% ella skulu útreiðslurnar lækka 35%, ella skal eitt sindur av hvørjum setast í verk, hevur Kappingarráðið roknað út.

Kristjan Davidsen, stjóri á Strandfeðsluni, sigur, at roknistykkið, sum Kappingarráðið setir upp, er ov einfalt.

At hækka prísirnar gevur neyvan fleiri inntøkur. Flutningurin á teimum økum, sum veruliga muna í inntøkunum, er í kapping við privatu vinnuna, so verður prísurin settur upp, fara onnur avstað við flutninginum. Hugsar serliga um flutning á meginøkinum, um Fiskaflutning o.s.fr.

Tí loysir ein príshækking ikki trupulleikan, sigur hann.

### Atlitið til útjaðaran takast burtur

Kristian Davidsen sigur, at í sambandi við útjaðaran fer tað kanska ikki at minka um flutningin at hækka farmagjaldið, tí fólkið har hevur ongar aðrar møguleikar.

– Men samanumtikið meta vit ikki, at tað gevur nakað at hækka farmagjaldið.

Tað skerst ikki burtur, at Farmaleiðir hevur stór sosial atlit í sambandi við útjaðaran, tí har hevur Strandferðslan átikið sær eina flutningsskyldu, hóast tað ikki er lógarfest.

– Men hendir onki annað, samstundis sum treytirnar frá Kappingarráðnum skulu fylgjast, má tað sosiala atlitið til útjaðaran takast burtur fyri fáa hallið hjá Farmaleiðum burtur, staðfestir stjórin á Strandferðsluni.

*Nú sleppa politikarar ikki undan at taka støðu til framtíðina hjá Farmaleiðum hjá Strandferðsluni. Kappingarráðið hevur kravt, at Farmaleiðir skulu ikki longur geva hall og tí er ein stórur spurningur, hvussu verður við flutninginum til og úr øllum útjaðaranum í Føroyum*

Tað merkir so aftur, at alt virksemið, sum ikki loysir seg, má steðga.

Stjórin í Strandferðsluni ásannar, at hetta kann fáa stórar avleiðingar fyri útjaðaran, tí sum støðan hevur verið, má Farmaleiðir metast at vera eitt felag fyri útjaðaran.

– Men nú skal Farmaleiðir bara hugsa vinnuligt og alt, sum ikki loysir seg, má sostatt sleppast og tað er fyrst og fremst flutningurin til og úr útjaðaranum, har lítið fólk b‡r.

– Tað sigur seg sjálvt, at talan verður um eina verri tænastu til útjaðaran. Orsøkin til hallið hjá Farmaleiðum er júst tann, at tær hava átikið sær ein flutning til útjaðaran, hóast tað hevur givið hall.

Kristian Davidsen heldur kortini, at hetta ger tað átrokandi hjá politikarum at taka eina avgerð um, hvussu Farmaflutningurin skulu skipast.

– Skulu Farmaleiðir rekast á handilsligum grundarlagi, má politiska valdið taka støðu til um hetta er ein uppgáva, sum landið skal átaka sær, ella um hon skal vera á privatum grundarlagi.

Hann heldur eisini, at hetta ger tað neyðugt at politikarar taka støðu til, um talan skal vera um flutningsskyldu, sama um tað verður ríkið á privatum ella almennum grundarlagi.

– At Kappingarráðið hevur tikið hesa støðuna, ger tað í øllum førum átrokandi at ein politisk støða verður tikin til framtíðina hjá Farmaleiðum.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á landsst‡rismanninum í samferðslumálum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

---

# Vilja knýta suðurøkið í Føroyum tættari saman

**Nú sandoyingar og skúvoyingar eru bodnir upp í barnaverndarsamstarvið í Suðuroy, er hetta ein roynd at styrkja suðurøkið í Føroyum, tí samstarvið kann víðkast til so nógv annað, sigur borgarstjórin á Tvøroyri**

BARNAVERND
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Høvdu vit fingið styrkt sambandið ímillum Sandoynna, Skúvoynna og Suðuroynna, hevði tað verið ein stórur fyrimunur.

Tað sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Og tað er júst fyri at seta hol á eitt samstarv ímillum hesar tríggjar tær syðstu oyggjarnar í landinum, at Tvøroyrar kommuna nú hevur bjóðað sandoyingum og Skúvoyingum at samstarva við suðuroyingar um barnaverndararøkið .

Kristin Michelsen sigur sostatt, at tað er misskilt, tá ið fólk halda, at tað er bara Sands Kommuna, sum er spurd, um áhugi er fyri at koma upp í barnaverndararbeiðið í Suðuroy.

– Vit hava sent sama fyrispurning til allar kommunurnar í Sandoynni og til Skúvoyar Kommunu, sigur hann.

### Onki løgið

Tað er annars fallið hvalbingum fyri bróstið, at Tvøroyrar Býráð hevur bjóðað øðrum upp í barnaverndarsamstarvið í Suðuroy, uttan at siga hinum kommununum í Suðuroy frá.

Men hetta skilir borgarstjórin á Tvøroyri als ikki.

– Tvøroyrar Kommuna hevur gjørt av at seta sosiala deild á stovn og barnaverndarsamstarvið í Suðuroy skal keypa tænastur frá sosialu deild á Tvøroyri. Tað er sostatt heilt natúrligt, at vit eisini senda ein følara fyri at vita um áhugi er í Sandoynni og Skúvoynni fyri at koma uppí og at keypa tænastur frá sosialu deild á Tvøroyri, eins og hinar kommunurnar í Suðuroy gera tað.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at higartil hevur Tvøroyrar B‡ráð bara hoyrt aftur frá Sands kommunu og hon er áhugað í at koma í eitt samstarv.

– Tað er sjálvandi ikki ætlanin at arbeiða uttanum hinar komunurnar í Suðuroynni og vísir tað seg at vera áhugi í Sandoy og Skúvoy fyri at koma upp í eina felags barnavernd við kommunurnar í Suðuroy, er tað sjálvsagt eitt mál, sum skal viðgerast saman við øllum kommunum í Suðuroy.

– Men tað er ongin orsøk til at leggja málið fyri allar kommunurnar í Suðuroy, fyrrenn vit hava fingið greiði á, um sandoyingar og skúvoyingar yvirhøvur eru áhugað fyri at samstarva.

– Er áhugi til staðar, verður tað eisini lagt fyri hinar kommunurnar í Suðuroy, tí tað skal tað sjálvandi vera í semju ímillum kommunurnar í Suðuroy.

### Menna suðurøkið í Føroyum

Kristin Michelsen vísir á, at sandoyingar og skúvoyingar eru næstu grannar hjá Suðuroynni.

– Talan er um eitt stórt økið og talan er um ein útjaðara í Føroyum.

Hann heldur, at fáa vit ment samstarvið ímillum hetta suðurøkið í Føroyum, kann tað bara vera ein fyrimunur, sum eisini fer at styrkja økið í mótspælinum við meginøkið.

Borgartjórin á Tvøroyri hugsar sær nevniliga, at eitt møguligt samstarv á barnaverndarøkinum bara er byrjanin til eitt størri samstarv.

– Nógv verður tosað um fast samband ímillum Sandoy og Streymoy. Men verður Suðuroyggin knýtt uppí hetta fasta sambandið, hevði tað styrkt munandi um kravið at fáa undirsjóvartunnil ímillum Sandoynna og Streymoynna

Kristin Michelsen sær nevniligafyri sær, at Suðuroy og Sandoy standa saman um kravið um fast samband ímillum Sandoy og Streymoy og at suðuroyingar verða knýttir uppí og at sigling tá verður ímillum Suðuroynna og Sandoynna.

Tað heldur hann kundi fingið títtleikan í ferðasambandinum munandi upp og júst títtleikin í ferðasambandinum, er størsti trupulleikin hjá suðuroyingum.



*Tað er fyri at seta hol á eitt tættari samstarv ímillum hesar tríggjar tær syðstu oyggjarnar í Føroyum, at Tvøroyrar b‡ráð nú hevur bjóðað kommununum í Sandoy og Skúvoy uppí samstarvið á barnaverndarøkinum í Suðuroy. Sands Kommuna er áhugað at tosa um samstarv*